# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lagnudagur hjá byggivinnuni

Í morgin verða tilboðini uppá leingjan av flogvøllinum í Vágum latin upp. Tá frætta vit, hvør fær eitt tað størsta byggiarbeiðið nakrantíð í føroyskari søgu. Flogvøllurin skal útbyggjast fyri nærum 400 mió. kr.

Tað er greitt, at spenningurin er stórur í byggivinnuumhvørvinum ikki minst her á landi, nú ringu tíðirnar hava havt stórar avleiðingar fyri virksemið hjá byggivinnuni. Henda vinnan er helst tann, sum merkir krepputíðinar mest, hóast fleiri almenn byggiarbeiði eru í eygsjón.

Stóri spurningurin er, um tað verða føroysk ella útlendsk byggifeløg, ið fáa hetta stóra arbeiði. Stóra ræðslan fyri, at uppgávan av royndum skal enda hjá útlendskum byggifeløgum er stór millum føroysku byggifeløgini.

Onkur vil siga, at útboð er útboð og takast skal tí av tí bíligasta tilboðnum. Tað skal vera líka fyri øll. Onnur vilja siga, at atlit eiga at verða tikin í slíkum máli, soleiðis at føroyska byggivinnan ikki stendur við sviðusoð, tá eitt so stórt arbeiði verður gjørt her á landi. Protektionisma ella ikki – her má bera til at tryggja okkara heimligu vinnu arbeiði – sjálvandi bara um hon er før fyri at gera uppgávuna.

Og tað loyva vit okkum ikki at ivast í eftir at hava sæð, hvussu íðin og dugnalig okkara egnu eru í byggivinnuni. Fyri bara at nevna tvey av feløgunum, sum hava gjørt tað gott, kenna vit øll nøvnini á Articon og J&K Petersen. Hesi hava prógvað, at tey standa mát við professionell útlendsk byggifeløg, og tann sannroynd, at Articon gjørdist ársins virki og at stjóri tess ársins leiðari sigur ikki so lítið um dygd og dugna.

Tað skal vera vón okkara, at útbyggingin av flogvøllinum í Vágum verður á føroyskum hondum og møguliga í tøttum samstarvi við útlendsk feløg, um hetta gerst neyðugt. Júmorgindagurin er sanniliga ein lagnudagur fyri føroysku byggivinnuna. Útbjóðararnir umsita her eina stóra ábyrgd, hvørs setningur eisini má vera at tæna føroyskum áhugamálum í tann mun hetta er rætt og gjørligt.

**Sosialurin**

## Dimma lurtaði ikki eftir dreingjunum



SOLBY A. ELIASEN
programmleiðari, Kringvarp Føroya

**Rættleiðing til oddagrein í Dimmalætting mánadagin tann 22. februar 2010**

Í hesi oddagrein finst greinaskrivarin at Kringvarpi Føroya fyri millum annað ikki at vera medvitað um sín leiklut í javnstøðustríðnum, tá ið barnaútvarpið í síðstu viku varpaði ljós á javnstøðu og millum annað spurdi børn, hvørjar húsligar skyldur tey hava við hús. Hendan sending varð síðani grundarlag undir oddagreinini hjá Dimmalætting mánadagin.

Greinaskrivarin finst at, at ongir dreingir – men bara gentur – vórðu spurdar, hvørjar húsligar skyldur tær hava, og at Kringvarp Føroya harvið fastheldur kvinnufatanini í einari aldargamlari siðvenju, sum ikki fremur javnstøðu millum kyn í Føroyum.

Harmiligt er tað, at greinaskrivarin grundar sína ákærur á eina misskiljing. Tí hevði hon ella hann ómakað sær at lurtað eftir barnaútvarpinum miku- og hósmorgunin eisini, hevði viðkomandi hoyrt dreingir greiða frá, hvussu teir hjálpa til við eitt nú uppvaski og matgerð við hús.

## Rættleiðing til Heðin Mortensen



ANNIKA OLSEN
landsstýriskvinna

Formaðurin í Kommunusamskipan Føroya, Heðin Mortensen, hevur í tíðindabrævi í dag misskilt ætlan mína um tilgongdina við at fremja umskipanina av kommunula geiranum uttan um kommunurnar. Sjálvandi skulu kommunurnar taka lut og sleppa til orðana í tilgongdini at umskipa kommunala geiran.

Ynski mítt er at fáa eitt breitt orðaskifti um álitið, sum kommunala umskipanarnevndin hevur latið mær, har m.a. umboð fyri Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya hava luttikið í. Hetta álit er nú lagt fyri Løgtingið til aðalorðaskifti. Í mong ár hevur tað vantað greitt útspæl frá landspolitiska myndugleikanum um, hvat skal gerast á kommunala økinum, og hevur hetta skapað ótryggleika hjá kommununum. Við virðing fyri kommununum eiga tær nú at fáa greitt at vita, hvat skal henda á kommunala økinum, og hvat tað er politisk semja um at fremja.

Tí er ætlanin við einum politiskum fylgibólki, ið er breitt umboðaður við limum úr øllum flokkum á tingi umframt avvarðandi landsstýrisfólkum, ið hava við kommunala bygnaðin at gera, at finna fram til neyðugar semjur á kommunala økinum. Sum skilst ynskir formaðurin í Kommunusamskipan Føroya at vera ein partur av hesum politiska fylgibólki, sum skal tryggja eitt parlamentarisk grundarlag fyri broytingum. Hetta stríðir ímóti Stýrisskipan Føroya. Tað er ikki vanligt, at onnur enn tey, ið eru vald í Løgtingið ella sita í Landsstýrinum, skulu tryggja grundarlag fyri parlamentariskum loysnum. Tó ætli eg sum landsstýriskvinna í kommunumálum, at bæði kommunufeløgini verða hoyringspartur í allari tilgongdini, og ikki bara, tá ið alt arbeiði er komið á mál, at fáa broytingarnar til hoyringar. Sostatt fáa feløgini bæði møguleika at gera sína ávirkan galdandi í allari tilgongdini.

Í vikuskiftinum var eg boðin á umboðsráðsfund hjá Føroya Kommunufelag, og í røðu míni segði eg m.a. at umframt at seta ein politiskan fylgibólk, ætli eg mær eisini út at tosa við tær 30 kommunurnar fyri at fáa teirra sjónarmið, soleiðis at grundarlag verður fyri einum uppskoti til samtyktar, har lagt verður upp til breiða semju um høvuðslinjurnar í komandi kommunalu umskipanini. Hetta er neyðugt fyri at tryggja, at kommunalu broytingarnar fara fram undir fólkaræðisligum meginreglum.

Kommunubygnaðurin hevur í mong ár staðið ovast á breddanum hjá politikarum, og hevur samgongan somuleiðis valt at raðfesta broytingar í kommunala geiranum. Búskaparliga standa vit sum samfelag framman fyri risastórum avbjóðingum, og tíðin er tann rætta at gera tær neyðugu bygnaðarbroytingarnar, ið skulu til fyri at reka samfelagið meiri skynsamt.

Við einari kommunalari umskipan eiga atlit at takast at kommunala sjálvræðnum. Tað er umráðandi, at kommunurnar sjálvar hava ávirkan á, hvussu tær ynskja at skipa teirra viðurskifti. Okkara uppgáva sum landspolitikarar er at tryggja kommununum teir bestu karmarnar at virka undir, soleiðis at kommunala sjálvræðið kann virka til fulnar.

Mín visjón fyri kommunalu umskipanini er: At skapa umstøður fyri staðbundnum sjálvræði, sum tryggjar vælferð, trivnað og vøkstur.

*Í Tinganesi,*
*22. februar 2010*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.